## VIÐMERKINGAR

# At skriva føroyskt

### Um søguligu gongdina í rættskrivingarmálinum (framhald)



Sum greitt frá í fyrra greinaparti blivu tað sjónarmiðini hjá danska professaranum N. M. Petersen, sum stuðlað av íslendinginum Jóni Sigurðsson og norska søgu- og málfrøðinginum P. A. Munch vunnu frama til eina rættskriving, sum V. U. Hammershaimb kom til at bera kannuna av - ein stavsetingarhugsjón, sum bæði hann og vinmaður og andsfelagi hansara Svend Grundtvig í fyrstu atløgu vildu venda sær ímóti, men sum teir tó, sum frá leið, lótu seg sannføra um og gjørdust talsmenn fyri.

Enn var lítið til av skrivligum føroyskum bókmentum - at kalla bert savningartilfar, ið var sent í umhvørvi, har allir menn høvdu kunnleika til fornnorrønt, og har áhugin í fyrsta lagi var vendur móti einari farnari tíð. Heitini á móttakarunum tala fyri seg: "Samfund til udgivelse af gammel nordisk litteratur", "Antikvarisk Tidsskrift" og "Annaler for nordisk Oldkyndighed".

Um ætlan Hammershaimbs við teirri etymologisku stavsetingini sigur eisini málfrøðingurin Kaj Larsen í grein í 61. bindi av Varðanum í 1994, *"at hon í fyrsta lagi skuldi kunna lesast av fremmandum, soleiðis at útlendskir granskarar lættari kundu fáa atgongd til eitt áhugavert fólkaminnisfrøðiligt tilfar"*. Nakað skriftmál til tað vanliga fólkið at samskifta við hevur skilliga ikki ligið frammaliga í huganum.

Hammershaimb átti mesta partin av tí, sum kom á prent í seinnu helvt av 19. øld, og tá hansara høvuðsverk "Færøsk Anthologi" kom út í 1891, høvdu føroyingar fingið eina veruliga bók at lesa í. Men við í hesari útgávu var eisini ein annar maður, og tað var **Jakob Jakobsen** (1864-1918). Hann var málfrøðingur burturav. Jákup hjá Bókbindaranum, sum hann varð kallaður í yngri árum, hevði upprunaliga kosið sær franskt og latín sum lesnaðargreinir á universitetinum. Men tað, at hann á Garði (Regensen) kom at búgva saman við íslendingi, sum bæði lærdi hann íslendskt mál og kveikti í honum áhugan fyri tí norrøna, og so tann tilburður, at Hammershaimb í 1884 ein dagin kom inn á Garð at biðja hann hjálpa sær í sambandi við ætlaða føroyska bókmentaútgávu, gjørdi, at hann hálsaði um og valdi at lesa norðurlandamál sum høvuðsgrein. Fyri sítt vísindaliga arbeiði máli í Hetlandi, vann Jákup Jakobsen sær seinni doktaraheiti og altjóða viðurkenning.

Men dr. Jacobsen var ikki bara tann kønasti bæði í føroyskum og í fornmálinum, soleiðis sum Chr. Matras eisini lýsir hann, men við fronskum máli sum hjágrein og so væl fyri í enskum, at hann bæði helt fyrilestrar í Bretlandi og skrivaði ritgerðir á enskum máli, visti hann eisini meira enn nakar føroyingur um bæði franskt og enskt mál og teirra stavseting.

Komin í arbeiði við handritum hjá Hammershaimb gjørdist tað honum greitt, at tann skriftmálabúnin, sum føroyskt her hevði fingið, hevði ov lítið samsvar við føroyskt gerandismál og fór at vera alt ov trupul hjá fólki at læra. Illa er annað hugsandi, enn at Jákup og Hammershaimb í teirra samarbeiði mugu hava umrøtt henda spurning um fonetiska, ljóðrætta, ella etymologiska, upprunafrøðiliga, stavseting. Men Hammershaimb var tá komin út móti teim sjeyti, hevði í so mong ár livað seg inn í tað skriftmál, sum honum á sinni var fingið upp í hendur, og ivaleyst hevur hann tí ikki verið sinnaður at leggja á annan bógv, aftur á ta rás, sum var slóðað undan honum, og sum hann innan ávirkanina uttanífrá hevði valt at fylgja.

Áhugavert er í hesum samanhangi tað brotið, sum Kaj Larsen endurgevur úr ævisøguni hjá dr. phil. Otto Jespersen (1860-1943), ivaleyst fremsta danska serfrøðinginum í enskum máli í sínari tíð, hvørs vísindaligu rit fleiri vóru týdd til fremmand mál, og hvørs lærubøkur enn í mínari barna- og ungdómstíð vóru tær mest brúktu í skúlunum. Um Hammershaimb, sum hann hevði lært at kenna og havt eitt ávíst samarbeiði við, skrivar Jespersen, at hesin *"... havde skabt det færøske skriftsprog, som i overensstemmelse med hans ungdoms synspunkter var landsk stavemåde. ... Jeg mente det var rigtigere at danne et færøsk skriftsprog udelukkende efter sprogets nuværende form uden skelen til oldtid og Island. Men han holdt på sit".*

Dr. Jacobsen ella Jákup doktari, sum hann eisini verður nevndur, setti sær nú fyri at laga til eitt annað, eitt meira ljóðrætt, uppskot til eina føroyska rættskriving, sum hann bar fram í "Dimmalætting" 1889. Fylgjandi dømi vísir hansara fyrstu stavsetingarhugmynd:

**Mikjenes hevur ættir manna sögn vere flotåiggj. Ain mävur y Sörváje, sum javnlia róe út, raddist idla störkvälenar úte á häve, o äv ty hann ikkje åtte bävur á stiggja tair burtur vi, hæie hann til tæss tarvamikjo, sum hann kastaje y sjægvin, tá y kvälir vóru när staddir bátenun.**

Henda nýggja stavseting veik so nógv frá teirri skriftarmynd, sum føroyingar tá vóru farnir at venja seg við, at hon mátti vekja til mótstøðu. Orðadráttur tók seg tí upp um hetta mál. Tey allarflestu hildu upp á "tað hammershaimbska"; men sum frá leið hildu tó fleiri og fleiri, at tørvur var á einari tillaging av viðurkendu stavsetingini, og endin á hesum drúgva tídrátti bleiv, at tað á ólavsøkufundi í 1893 varð samtykt í Føringafelag at seta nevnd, har Hammershaimb og Jákup Jakobsen - teirra millum var vinalag alla teirra samverutíð - skuldu velja hvør sín lim, felagið tveir og so hesir seks ein aftrat. Henda 7-mannanevnd skuldi *"...avgera, hvussu skrivingarlagið skal verða, ið felagið skal brúka, og skal tað, ið henda nevnd kemur á samt um, verða bindandi firi felagið".*

Nevndararbeiðið gekk striltið, eisini tí at Jákup Jakobsen var ikki heima tá í tvey ár. Men í oktober 1895 kundi Jákup leggja fyri nevndina í Føringafelag tað uppskot, ið sjeymannanevndin var komin ásamt um. Hetta uppskot fekk heitið "Broyting".

Sostatt skuldi tá verið komið á mál við hesari telving um eina føroyska rættskriving; men so var ikki.

Høvdingurin í vaknandi føroysku tjóðskaparrørsluni tann hug- og vitbjarti, men eisini bráðræsni og ráðaríki Jóannes Patursson, sum sjálvur hevði verið við til at seta nevndina til at avgera rættskrivingarspurnuna. Innleiðandi í "Føringatíðindi" 1. oktober 1896 sigur hann seg nú frá sum blaðstjóri, meldar seg úr Føringafelag, og í drúgvari grein greiðir hann frá sínari støðutakan.

Hetta stigið hjá Jóannesi bónda harmaði allar framtakshugaðar føroyingar, og um enn tað ikki er beinleiðis viðkomandi í hesum sambandi havi eg, hugsandi um, hvussu viðurskiftini tá, sum frá leið, fóru at taka seg upp í okkara samfelag, hug til at endurgeva stubba úr tí, sum Andras Sámalsson skrivaði í eftirfylgjandi Føringatíðindi: *" At J. P. fór úr Föringafelag, var alt annað enn stuttligt. Felagið misti har sín besta mann. Hann var ein tann fremsti at birta lív og fosturlandsalsk í Föringar, og tað kundi verið, at um hann var burtur, so einki Föringafelag var til enn. Takk skulu vit siga honum fyri alt, hann hevur gjørt og viljað gjørt fyri Förjar og Föringar, meðan hann var í Föringafelag; tað, ið hann hevur skrivað síðani hann fór úr felagnum her í blaðið, kunnu vit tíverri ikki takka honum fyri ".*

Av tí at Jóannes bóndi í sínari áðurnevndu grein eisini vildi vera við, at broytingin als ikki hevði meirilutan í rættskrivingarnevndini aftan fyri seg, seta teir fimm Anton Degn, B. A. Samuelsen, Dione Isaksen, T. J. Petersen og Andras Sámalson, ið allir høvdu virkað fyri at fáa eina loysn á rættskrivingamálinum, fram fyrispuring til sjeymannanevndina í Føringatíðindi 15. oktober 1896, um tað var so, sum Jóannes skrivaði, *"at tann sjeymannanevndin, sum av Føringafelag á ólavsøku 1893 varð kjósað til at avgera, "hvussu skrivingarlagið skuldi verða, ið felagið skuldi brúka", einki dámar hettar uppskotið, sum nevndin sendi Føringafelag í fjør heyst..."*

Í blaðnum 7. januar 1897 greiða teir sjey nevndarlimirnir V. U. Hammershaimb, Jakob Jakobsen, J. Hammershaimb, J. C. Olsen, Chr. Bærentsen, C. L. Johannesen og Fr. Petersen frá nevndararbeiðinum og vátta, at: "Vit hava adlir sjey undirskrivað avgerðina, og harí liggur sjálvsagt, at vit adlir hava samtikt í, at so skuldi vera, og hesum vilja vit filgja, tá ið vit skriva føriskt mál." Í framhaldi stendur: *"Tað, sum vit so adlir sameintust um, er tað uppskotið, sum vit sendu felaginum í fjør heyst, og vit halda adlir, at tann klædningur, sum málið Vit hava lagt góðan vilja í verk okkara í tí hopi, at tað skuldi gera góðan enda á stríðinum, ið var, og at adlir Føringar í framtíðini í hesum luti vilja ganga saman í einum flokki..." Síðan fylgja nøkur rósandi og inniliga áheitandi orð til Jóannes bónda um "...attur at taka við felagsarbeiðinum til frama firi tað gamla Førjamál."*

Bóndin kundi tó ikki geva seg. Hann helt fram við sínum stavnhaldi. Í blaðnum "Fuglaframi" hjá bróður sínum Sverra Patursson, sum fór at koma út í 1898, helt hann fram við sínari eldhugaðu viðgerð av føroyskum viðurskiftum og var í sínari skriving saman við Sverra við til aftur at grundfesta óbroytta stavingarlagið hjá Hammershaimb, ja, enntá til at geva tí eitt enn fornari snið.

Men Jóannes Patursson stóð ikki einsamallur í sínum víggi. Undirtøku fekk hann frá lesandi føroyingum í Keypmannahavn, sum høvdu tikið ta hammershaimbsku stavsetingina til sín - ja, vóru vorðnir so fegnir um pyntiliga leikafuglin, sum eg fyrr havi skemtað við, at teir máttu kenna tað sum eitt hóttafal móti sjálvum móðurmálinum, at sjeymannanevndin hevði slakað. Hesir sendu áheitan til teir sjey um at taka málið upp til nýggja viðgerð; men nevndin metti sína uppgávu at vera lokna.

Ein aðal grundgeving hjá studentunum fyri at halda fast við stavseting Hammershaimbs var, at hon skuldi geva føroyingum betri samband við íslendskt og fór eisini at kunna skapa ein marknað í Íslandi fyri framtíðar føroyskum bókmentum. Til stuðul fyri hesi síni sjónarmið vendu teir 19 føroyingarnir, sum høvdu tikið málið upp, sær til dr. phil. Valtýr Guðmundsson, dosentur í íslendskum bókmentum og søgu við lærda háskúlan í Keypmannahavn, við tveimum spurningunum: 1) "Fer nýggja stavsetingin at gera tað tvørligari fyri íslendingar at skilja skrivað føroyskt?" 2) "Verður stavsetingin í Færøsk Anthologi ella "Broyting" føroyingum at mesta gagni?". Sambært Kaj Larsen gav lærdi íslendingurin í drúgvum svari - ivaleyst bæði ætlað og vantað - til kennar, at "íslendingar uttan trupulleikar kunnu lesa føroyskt, tá ið tað er skrivað við Hammarshaimbs stavseting; men ein vanligur íslendingur man neyvan endurkenna orðini lættliga, tá ið skrivað er við Broyting".

Tað vóru tó fleiri enn Jóannes bóndi og studentarnir, sum hildu tað vera ráðiligast hjá okkum føroyingum í mest møguligan teirra var ommubeiggi Jóhan Dam, bóndi við Sjógv í Kollafirði. Hann var sera gávuríkur maður, las og skrivaði enskt so væl, at hann hevði brævaskifti við mentamenn uttanlands á hesum máli, hevði eisini góða hylling á týskum, og í fornnorrønum var hann so kønur, at hann eisini yrkti á hesum frummáli.

Jóhan hevði eitt droymandi lyndi, og hugur hansara sveimaði ofta burtur frá tí gerandisliga og helst aftur til fortíðar stórleika, so sum hann kemur til sjóndar í íslandssøgunum, ið vóru hansara kærasti lesnaður. Um andaliga afturgongd og framtíðar útlit her í oyggjunum yrkti hann hesi ørindi:

FÆREYINGAKVIÐA
Hljóðs biðjum ljúfir þér
heyrið til
eitt sorgarhljóð!
Harmsprungnir høldar nú
kveða vil
um Førjaþjóð!
Ódn hefir limin af askinum
brotið,
ei batnar brestr því benið er
rotið,
rotnað af rakstri í aldarflóð!

Alin óks askr í garði Gors
hitt aldna tré.
Þótt nornin laust limin af
viði Nors!
Mun látin sé?
Rætur ór greinunum ei
megu gróa!
Framar þú getur sjalft
frumefnið sáa,
ef þú vilt gæta hitt gamla
Gimle.

Fræ veit ek frjóðgast ok
vaxa fritt
á Jøklalønd.
Sá þú hitt sama er þar, er
þýtt
við Førjastrønd.
Heimskringla, Edda ok
yms eru heiti.
þá þróast máttr ok mentun
er teiti.
Bundin sé baðmr með
stuðul ok bønd.

Er tað nú so, at okkara afturskoðandi skrivingarlag veruliga letur okkum føroyingum upp fyri tí fornnorrøna, skuldi umseting ikki verið neyðug.

Finnur tann serkøni funnið okkurt brekið í málinum ella í uppsetingini, er tað at hava í huga, at morbróðir Petur á Heygum skrivaði hana niður eftir minninum frá kvøldi til morgun, av tí at hin gamli tók ljósið frá honum, tí hann vegna misskiltar trúar sakir vildi beina fyri øllum, hann hevði yrkt - m.a. eitt megnarkvæði um slagið á Stiklastøðum, verður sagt -, og vildi ikki lata nakað fest á blað liggja eftir seg.

(Meira)



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# [Teir] & [Tara] í Elektron

**5. mars læt nýggjur klædnahandil upp í bygninginum hjá Elektron við Staravegin í Havn. Talan er um [Teir] & [Tara], sum selur klæðir til mannfólk og konufólk og eini serligari deild við klæðum til ungfólk**




*Starvsfólkini hjá [Teir] & [Tara] f.v.: Sámal Joensen, Hans Anton Thomsen, Hansi Kálvalíð, og Byrgerð Kjærbæk*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

[Teir] stendur fyri klæðum til mannin og [Tara] stendur fyri klæðum til kvinnuna. Handilin leggur dent á eisini at hava klæðir í stórum støddum. Á deildini við klæðum til ungfólk eru fleiri nýggj merkir, sum ikki hava verið seld í Føroyum áður. Bonnie & Clyde verður navnið á hesi deildini, sum leggur seg eftir at vera fyrst við tí nýggjasta mótanum. Ætlanin er eisini at fara at selja skógvar seinni í ár.

Tað er Hans Anton Thomsen í Saltangará, sum eigur handilin. Hann 43 ára gamal, ættaður av Strondum og býr í Saltangará. Hann lærdi til krambarkall hjá Thomas Dam í Havn frá 1979-82 og arbeiddi eitt ár á einum byggimarknaði í Týsklandi.

Í 1985 byrjaði hann sum sjálvstøðugur og læt upp klædnahandilin Jungmann í Saltangará. Frá 1989-91 hevði hann eisini eina deild í Niels Finsensgøtu í Havn.

Hann byrjaði aftur við eini deild hjá Jungmann við Heykavegin í Havn í 2001, til hann nú læt nýggja handilin [Teir] og [Tara] upp við Staravegin.

Í Havn eru tey fýra starvsfólk og hjá Jungmann í Saltangara eru tvey starvsfólk.

## Eliesar Kastalag 60 ár



Í dag verður Eliesar Kastalag á Glyvrum 60 ár. Eliesar er føddur í Klaksvík 19. mars 1944, sonur Jenny og Jógvan Kastalag.

Tey fyrstu árini, aftaná at hann var liðugur í skúlanum, var hann til skips og síðan fór hann í læru á Bedingini í Klaksvík. Eftir at hann hevði fingið sveinabræv sum træskipasmiður, fór hann á skúla í Odense at læra til "bygningskonstruktør", sum tað tá varð kallað.

Heimafturkomin úr Danmark fekk hann starv hjá Landsverkfrøðinginum á Lambareiði og arbeiddi har til hann í 1970 fekk starv sum byggifrøðingur hjá Runavíkar kommunu, har hann framvegis starvast.

Eliesar hevur í nógv ár verið froskmaður - bæði til stuttleika og álvara. Av stuttleikaupplivingum kann sigast, at hann fleiri ferðir hevur svomið um Nólsoyarfjørð. Eisini hevur hann arbeitt nógv sum yrkisfroskmaður og ikki at gloyma bjargingaruppgávurnar og var hann eisini á "Katastrofulistanum" hjá løgregluni, har uppgávurnar ikki altíð vóru so tespiligar.

Eliesar hevur verið virkin í skótarørsluni frá ungum árum av og var hann stigtakari til at seta Skótalið Grím Kambans á Glyvrum á stovn í 1983. Skótalívið hevur givið honum sera nógv og dámar honum væl at fortelja um hetta.

Eliesar er giftur Karini av Toftum og eiga tey 3 børn, Elin, Jógvan Ivar og Hanus og 6 barnabørn.

Føðingardagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum í kvøld.

Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum og gleða okkum til, at tú kemur aftur til arbeiðis á skrivstovuni.

# Profa Gólv flutt til Elektron




*Starvsfólkini hjá Profa Gólv: Andrias Jørgensen, Herfinn Hansen, Johan Nystrøm, Eyðfinn Eyðunsson, Edvard Højgaard, Finnur Hansen, Andrias Dam, Bogi Nystrøm og Sakaris Heinesen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**5. mars læt Profa Gólv upp í bygninginum hjá Elektron við Staravegin í Havn**

Nú eru tveir Profa handlar við Staravegin, Profa Farvur og Profa Gólv.

Tað er Eyðfinn Eyðunsson av Argjum sum eigur og rekur Profa Gólv. Eyðfinn er 39 ára gamal, hann byrjaði sum gólváleggjari í 1982 og stovnaði sína egnu fyritøku, Fa. Eyðfinn Eyðunsson, í 1992.

Í 1997 stovnaði hann saman við bróður sínum, Eyðun Mouritsen, fyritøkuna, Profa Farvur, sum eisini heldur til við Staravegin.

Í 2002 avgjørdu teir at hava tveir handlar og stovnaðu eitt nýtt partafelag, soleiðis at Eyðun helt áfram við Profa Farvum og Eyðfinn byrjaði við Profa Gólv, sum hevur hildið til við Smyrilsvegin til 5. mars í ár.

Profa Gólv er ein fyritøka, sum hevur specialiserað seg innan gólv og gólválegging. Teir selja alt frá venyl- og parkettgólvum til teppir og gera eisini baðirúm.

Umframt til privatkundar gera teir eisini alt gólvarbeið fyri fyritøkur og stovnar, teir hava t.d. lagt alt gólvið í bygninginum hjá Fíggjarmálastýrinum á Argjum og Sparikassabygninginum Yviri við Strond og eru júst nú lidnir við alt gólvarbeiði á nýggja bygninginum hjá Landssjúkrahúsinum.

Í fyritøkuni starvast 9 mans, har teir flestu arbeiða sum gólváleggjarar.

## Dagurin

**19. mars. Jósef**. Dagurin verður hildin til minnis um festarmannin hjá Mariu Moy. Hann gjørdist, sum vera man, halgimenni hjá húsasmiðjum og handverksmonnum.

Bíbilska navnið merkir *Guð lati meg fjølgast.*




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin